## Útbering av dagbløðum og reklamum



**LEYST STARV**

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út á **vesturbýnum.** Ert tú 13 ár ella eldri, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 55 14 00** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost: **utbering@prent.fo**

**Prentmiðstøðin**

Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 55 14 00 · Útbering tel 55 14 05 · Fax 55 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Fíggjarfulltrúi/controllari

Eitt starv sum fíggjarfulltrúi/controllari í Nærverkinum verður hervið lýst leyst til setan skjótast tilber.

Talan er um eitt sjálvstøðugt starv í fakligum umhvørvi, har møguleiki er fyri at vera við til at menna fíggjarøkið í Nærverkinum.

Nærverkið er skipað við Meginskrivstovu og 4 tænastudeildum. Virksemið er skipað um alt landið. Tað starvast uml. 1400 fólk í Nærverkinum. Í løtuni rekur Nærverkið virksemi fyri uml. 500 mió. kr. árliga. Nærverkið er í støðugum vøkstri og stórar uppgávur liggja fyri framman innan øll okkara virkisøkir.

Nærverkið leggur dent á at hava eina miðvísa og javna tænastu innan teir karmar, politiska skipanin ásetur. Fíggjarstýring, játtanareftirlit og áhaldandi leiðslukunning hevur í hesum sambandi ein avgerðandi leiklut.

Vit hugsa okkum ein persón, ið dámar væl at arbeiða við tølum og dugir at samantvinna fíggjarliga tilfeingið við virksemið, ið fer fram í Nærverkinum. Hevur evni at skapa og framleiða vitan, ið kann nýtast sum grundarlag undir allari støðutakan og leiðslukunning. Hevur hegni til at skapa framtíðarloysnir og at seta hesar í verk, er sjálvstøðugur, hjálpsamur og hevur góð samstarvs- og samskiftisevnir.

**Vit leggja eisini dent á, at tú:**

- Hevur viðkomandi útbúgving, helst frá hægri lærustovni
- Hevur royndir innan fíggjarstýring
- Ert kønur í telduskipanum og dátugrunnum
- Hevur kunnleika til almenna fyrisiting
- Hevur málsligt hegni og dugir væl at orða teg skrivliga
- Ert álítandi og nærlagdur.

Starvið er skipað við tilvísing til leiðsluna fyri Búskapardeildina, ið er skipað sum tvørgangandi stápur á Meginskrivstovuni.

**Løn- og setanarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Setanarøkið fevnir um Nærverkið og tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan.
Meiri fæst at vita við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra, á tlf. 360000.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
FO-110 Tórshavn

Stílað: Mary J. í Garði, stjóri

**Umsóknarfreist:** 24. november 2008

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

GIKTAFELAG FØROYA

## Frá Giktafelagnum

Í sambandi við altjóða giktadagin, sum er sunnudagin 12. oktober, hevur Giktafelagið opið hús í MBF-húsinum frá klokkan 15-16.

Í ár eru 60 ár síðani felagið varð stovnað, og tí bjóðar felagið til móttøku, har Monika Strauss Joensen og Dánjal Eystursteinn framføra tónleik, og okkurt leskiligt verður at fáa.

Øll eru vælkomin!

**Giktafelag Føroya**

Lesið Sosialin -tað loysir seg

Lesið Sosialin -so eru tit við!

## Bilar til sølu

3 gamlir Mitsubishi Pajero til sølu.

2 við setrum og 1 vøruvognur.

Allir eru koyriklárir. Verða seldir heilt bíliga.

Boð yvir kr. 5.000,- kunnu góðtakast.

**Áhugað kunnu ringja tlf. 283832 ella 281669**

## TØKK



Havnar Róðrarfelag takkar hjartaliga øllum stuðlum, sponsorum og hjálparfólki, ið á ymsan hátt hava stuðla okkum í kappingarárinum 2007/2008.

Uttan tykkara stuðul og hjálp høvdu vit neyvan rokki teimum góðum úrslitunum í summar.

**Takk fyri vh Havnar Róðrarfelag.**

Lesið Sosialin - so eru tit við